**Nr. 50/2014**

**Kristina Háfoss**
**løgtingskvinna**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um "Det Systemiske Risikoråd", settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hví mælir landsstýrið til at nýta "Det Systemiske Riskikoråd" til at hava yvirskipað eftirlit við øllum tí føroyska fíggjargeiranum?
2. Metir landsstýrismaðurin tað vera rætt, at danskir myndugleikar skulu røkja eftirlitsuppgávu á fíggjarligum økjum, har føroyingar hava heimtikið ábyrgdina, herundir eftirlitsskylduna?
3. Hvør føroyskur stovnur røkir í dag uppgávuna, ið landsstýrið mælir til at lata til "Det Systemiske Risikoråd"?
4. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi at lata upp í hendurnar á einum donskum ráði at røkja fíggjarligt váðaeftirlit við atliti til føroyska fíggjargeiran, føroyska búskapin og føroyska samfelagið?
5. Hevur landsstýrið kravt, at Føroyar fáa umboð í "Det Systemiske Risikoråd"?
6. Hví ikki lata ein endurstovnaðan Landsbanka Føroya røkja yvirskipaðu fíggjarligu eftirlitsuppgávurnar, ið nú verða lagdar til "Det Systemiske Risikoråd" í Keypmannahavn?

**Viðmerkingar**
Fíggjarkreppan lærdi flestu lond, at tað ikki er nóg mikið at hava fíggjareftirlit, ið hava eftirlit við hvørjum fíggjarstovni sær, men neyðugt er eisini við yvirskipaðum samfelagsbúskaparligum eftirliti, ið støðugt heldur eyga við váðunum í fíggjargeiranum sum heild.

Í kjalarvørrinum av fíggjarkreppuni setti ES tí eisini í 2011 á stovn eitt ráð (European Systemic Risk Board – ESRB), ið skuldi hava yvirskipað eftirlit við teimum váðum, ið eru í fíggjargeiranum. Mælt varð samstundis til, at europeisku londini tryggjaðu, at stovnar fingu til uppgávu javnan at hava eftirlit við sokallaðu systemisku váðunum í fíggjargeiranum. Dømi um hesar eru stórt samlað undirskot av innlánum í mun til útlán, og tá bústaðarprísirnir vaksa meira enn haldgott er, og sokallaðar "bústaðarbløðrur" gerast veruleiki.

Eftir fíggjarkreppuna hava flestu lond styrkt sínar tjóðbankar fyri m.a. at styrkja samfelagsbúskaparliga eftirlitið. Í 2013 stovnaðu danir hartil teirra "Systemiske Risikoråd". Ráðið húsast í Danmarks Nationalbank, hvørs ovasta stjórn eisini hevur formansskapin í ráðnum. Endamálið er m.a. javnan at staðfesta og hava eftirlit við fíggjarligum váðum í Danmark, umframt koma við ávaringum og tilmælum til átøk at minka fíggjarligar váðar í Danmark.

Í Føroyum valdi landsstýrið at ganga beint øvugt. Tí í 2013 avtók landsstýrið Landsbanka Føroya. 1. apríl 2013 varð Landsbankin heilt avtikin. Landsbanki Føroya var annars einasti óhefti samfelagsbúskaparligi stovnur Føroya, ið m.a. javnan fylgdi

gongdini í føroyska fíggjargeiranum og gjørdi eitt nú javnan frágreiðingar við serligum atliti at gongdini í føroyska fíggjargeiranum.

Mett verður, at tær uppgávur, ið landsstýrið mælir til at leggja til danska “Det Systemiske Risikoråd” í Danmarks Nationalbank, høvdu verið natúrligur partur av virksemi Landsbankans, um hesin ikki varð avtikin av samgonguni og landsstýrinum.

Umframt at hava eftirlit við føroysku bankunum mælir landsstýrið nú eisini til, at “Det Systemiske Risikoråd” skal hava eftirlit við øllum tí samlaða føroyska fíggjargeiranum. Eisini tí partinum har føroyingar hava heimtikið ábyrgdina av – herundir eftirlitsskylduna.

Fyri at fáa lýst málið verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

**Á Løgtingi, 29. januar 2015**

Kristina Háfoss